# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Hendan framferð kann helst koma at kosta Starvsmannafelagnum dýrt, tí um felagið ikki virðir onnur fakfeløg, so kann Starvsmannafelagið skjótt koma at standa einsamalt*

*Hans Joensen, form. Havnar Arbeiðsmannafelag*

## Eitt gylt høvið: Tórshavn - Róm - París

Hóast Italia og Frakland teljast millum heimsins bestu fótbóltstjóðir mundu fá av okkum gáað um, at tað skuldu blíva júst hesi bæði londini, sum endaðu í HM finaluni í fótbólti. Og orsøkina til at vit tosa um hesi bæði londini er tann, at Føroyar skulu til at spæla móti nettupp Italia og Fraklandi til komandi EM-undan kapping.

Nú hendi tað so ótrúliga, at Føroyar sum ein hin minsta fótbóltstjóðin í heiminum, skal møta teimum báðum størstu og entá í so frægum og søguligum býum sum Rom og París.

Vit hava viðgjørt henda spurning áður á hesum stað og inni í blaðnum, og vit kunnu tí bert endurtaka, at vit eru ómetaliga heppin at skula spæla ímóti teimum størstu. Hóast onkur vildi verið hetta fyriuttan, tá hugsað verður um, at vit kunnu vera fyri dyggiligum tapum, so er hetta kortini eitt einastandandi høvi at marknaðarføra Føroyar uppá. Henda nærsagt ókeypis reklama - verður hon rætt brúkt - kann vera gullverd fyri okkum. Vit fara av álvara at koma á heimskortið, og tað kann vera við til at menna okkara ferðavinnu eins og tað kann skapa áhuga fyri teimum mongu vørum vit hava at bjóða umheiminum.

Latið okkum tilrættaleggja hetta væl og virðiliga. Ikki bara sita og bíða og vita, hvat hendir. Her eiga bæði myndugleikar, vinnulív og onnur at seta hvørjum øðrum stevnu við eini dagsskrá: hvussu fáa vit góð úrslit móti hesum londum og hvussu kunnu vit brúka hesar fótbóltsdystir til at profilera og marknaðarføra okkum sum tjóð.

Hvat við at almennu Føroyar, landsstýrið onkursvegna, sjálvt tekur stig til ítøkiliga at betra um karmarnar hjá fótbóltslandsliðnum til komandi dystir. Hetta kann gerast uppá so nógvar mátar. Tað verið seg at fáa okkum útlendska professiónella hjálp bæði á venjaraøkinum og til servenjing av spælarum. Latið okkum tora at hugsa ótraditionelt og øðrvísi, tí nettupp henda støða vit eru komin í er ótraditionell og øðrvísi. Eitt vælfyrireikað og vælspælandi landslið kann skapa enn eina sensatión, og kanska eina, sum er størri enn hon móti Eysturríki á sinni. Latið okkum ikki formøblað henda einastandandi møguleika. Setið út í kortið nú.

**Sosialurin**

# Starvsmannafelagið hevur stungið Havnar Arbeiðsmannafelag í Ryggin?

**HANS JOENSEN**
Formaður, Havnar Arbeiðsmannafelag



Nú hevur rættuliga nógv verið frammi í fjølmiðlunum, um royndirnar hjá Starvsmannafelagnum at fáa portørarnar í felag teirra.

Eg skal ikki fara inn í smálutirnar í hesum ódámliga leiki, men greitt er at formaðurin í Starvsmannafelagnum Gunnleivur Dalgarð hevur ikki sakliga upplýst um fyrimunir og vansar við limaskapi í ávíkavist Havnar Arbeiðsmannafelag og Starvsmannafelagnum.

Hinvegin hevur framferðin hjá Starvsmannafelagnum sett spurnartekin við framtíðarsamstarv innan føroyska fakfelagsrørslu.

### Framferðin hjá formanninum

Sum ein av portørunum greiðir frá í lesarabrævi í Dimmalætting í gjár, so hevur Gunnleivur Dalsgarð í rúma tíð havt samband við nakrar portørar umframt at hann hevur vent sær til Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum uttan at gretta orð fyri okkum í Havnar Arbeiðsmannafelag, og endamálið hevur alla tíðina verið, at fáa samráðingarrættin fyri økið hjá portørunum flutt frá Havnar Arbeiðsmannafelag til Starvsmannafelagið.

Hetta verður gjørt hóast Gunnleivur veit, at Havnar Arbeiðsmannafelag altíð hevur havt hetta sáttmálaøki, og at tað eru portørunum og felag okkara, sum hava æruna av, at sáttmálaviðurskiftini hjá portørunum eru so fræg, sum tey eru í dag.

Tað er lætt hjá Starvsmannafelagnum at royna at yvirtaka eitt sáttmálaøki, sum onnur hava bygt upp, men neyvan nakar annar fakfelagsleiðari í Føroyum hevði kent seg freistaðan at brúka so skitnan framferðarhátt móti øðrum pørtum av fakfelagsrørsluni, sum júst Starvsmannafelagsformaðurin her hevur brúkt.

### Orð og gerð samsvara ikki hjá Gunnleivi

Nú Gunnleivur Dalsgarð verður avdúkaður í sínum skýmaspæli kemur hann fram í fjølmiðlunum og sigur at partarnir eiga at tosa saman.

Hesi úttalilsi eru bæði látúrlig og grátulig, tí heldur Gunnleivur veruliga, at vit í Havnar Arbeiðsmannafelag fara inn í nakað orðaskifti við eitt felag ella ein fakfelagsleiðara, sum so greitt hevur víst, at hann og leiðsla felagsins als ikki tykist at hava nakra sum helst virðing fyri øðrum fakfeløgum og sáttmálaøki teirra.

Hví kom Starvsmannafelagsformaðurin ikki fyrst til okkum í Havnar Arbeiðsmannafelag, soleiðis at vit saman kundu tosa opið um teir spurningar, sum tørvur møguliga er at tosa um?

Starvsmannafelagið tykist bert at vilja hava samstarv tá tað gagnar teirra felag

Starvsmannafelagið hevur ofta tosað um samstarv millum fakfeløgini, og eisini hevur felagið verið við til at tikið ítøkilig stig til samstarv, tá t.d. politiski myndugleikin gekk áhugamálunum hjá føroyska løntakaranum ov nær. Vit sum umboða onnur fakfeløg hava skilt, at her var talan um ein veruligan vilja hjá leiðsluni í Starvsmannafelagnum til samstarv millum føroysku fakfeløgini, men tá vit í dag kunnu staðfesta, at Gunnleivur Dalsgarð so dyggiliga hevur stungið okkum í Havnar Arbeiðsmannafelag í ryggin, so má niðurstøðan vera tann, at Starvsmannafelagið bert vil hava samstarv, um tað tænir teirra egnu áhugamálum.

Tá hetta er fyritreytin fyri samstarvi, so er hetta samstarv lítið vert.

Ber til at samstarva við eitt fakfelag, sum onga virðing hevur fyri øðrum fakfeløgum?

Vit, og helst øll fakfeløg í landinum, mugu í dag seta sær spurningin, um tilber at fara inn í nakað samstarv við Starvsmannafelagið, tá hetta felag als onga virðing hevur fyri øðrum fakfeløgum.

Fyri mítt viðkomandi má eg ásanna, at trupult verður hjá mær og nevndini í Havnar Arbeiðsmannafelag, at fara inn í nakað framtíðarsamstarv við eitt felag, har leiðslan fer aftan fyri ryggin á øðrum fakfeløgum, og uttan fyrilit roynir at kroysta seg inn á sáttmálaøkið, sum altíð hevur hoyrt til annað fakfelag.

Starvsmannafelagið hevur við stuttskygdu framferð sínari lagt lunnar undir spjaðing innan føroysku fakfelagsrørsluna í staðin fyri at arbeiða fyri øktum samstarvi.

Hendan framferð kann helst koma at kosta Starvsmannafelagnum dýrt, tí um felagið ikki virðir onnur fakfeløg, so kann Starvsmannafelagið skjótt koma at standa einsamalt, og ábyrgdina fyri einari slíkari gongd eiga teir sjálvir.

*Tórshavn tann 6. juli 2006*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.